# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 8. september 2015, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Durita á Heygum, Hilbert Elisson, Malan Stórá og Herit Magnussen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

John Zachariassen møtti ikki á fundinum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 143**
Uppskot frá umsitingini um broytingar í reglunum um heiðurin sum ársins borgari.
J.nr. 00.06.00-G01-1-14

**Viðv. 144**
Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt.

**Mál 144**
2. viðgerð av eyka fígging til eldraøkið.
Vestmanna Kommuna rindar í ár kr. 54.576,70 pr. borgara 67 ár og eldri, meðan hinar kommunurnar í samstarvinum, Kvívíkar, Eiðis og Sunda Kommunur, rinda kr. 58.663,30 pr. íbúgva 67 ár og eldri. Hetta svarar til, at Vestmanna Kommuna skal gjalda kr. 878.612 avtrat fyri at gjalda tað sama, sum hinar kommunurnar inn í samstarvið.
Hesar kr. 878.612 koma at vanta í, um raksturin av Heimatænastan í VEKS skal hanga saman fíggjarliga, uttan at munandi broytingar verða gjørdar í rakstrinum hjá samstarvinum.
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælir tískil bygdarráðnum til við 2. viðgerð at játta kr. 878.612 í eyka fígging til eldraøkið.

**Viðv. 144**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

Pauli T. Petersen    Karl A. Olsen    Hilbert Elisson    Herit Magnussen

Durita á Heygum    Malan Stórá